# Kjak



T. M. Smith

## Tøkk til Rituna

Meðan eg siti við stovuvindeygað og hyggi út á fjørð, fer Ritan fram við boyuni úti fyri Tinganesi á síni fleiri og túsundi ferð til Nólsoyar. Eg siti og stúri ikki sørt fyri, tá ið hon fer seinasta túrin út hagar, tí í Tinganesi hava tey gjørt av, at taka hana frá nólsoyingum og flyta hana norður í Norðoyar at sigla í staðin fyri at byggja svínoyingum og fugloyingum eitt nýtt skip.

Nú meðan eg eri við hetta, at byggja skip her á landi, sær út til, at her má einki henda í so máta. Í staðin fyri at tað var so sjálvandi at farið undir at bygt okkum eitt nýtt fiskirannsóknarskip, sum er púra klárt frá teknborðinum, so hendir hvørki eitt ella annað. Eg skilji ikki slíkan politikk, og tað eru tað nógv við mær, ið heldur ikki skilja eitt petti av.

Nú aftur til Rituni. Eg minnist so væl tá ið John bróðir sat í køkini og teknaði fyrsta útkastið til Rituna. Fyrst skuldi sjálvandi havast í huga longd og breidd, og út frá tí var skjótt komið til útsjóndina, eina útsjónd, sum var eitt John Smith-design. Hann hevði ein



linjusans fyri skipum, sum var sera vakur, og sjálvandi eisini var praktiskur og hóskiligur til endamálið. So fór hann í holt við innrættingina. Maskinrúmið og brúgvin fingu síni pláss, og so plássið til ferðafólkið.

Tann endaliga tekningin varð latin landsstýrinum, og Ritan bleiv bygd í Monnickendam í Hollandi eftir hesi tekningini í 1971.

Sjálvandi vórðu aðrar útrokningar gjørdar, stabilitetur og annað, og úrslitið var, at tað neyvan hevur verið bygt betri sjóskip enn Ritan til okkara strandferðslu. Eg haldi ikki, eg fari skeivur, tá ið eg sigi, at hon hevur fæst avlýsingar fyri veður enn hini strandfaraskipini.

Hon er nú 39 ára gomul, og hóast tað, hevur hon enn dám av einum nútímans skipi.

Hesa løtuna við vindeygað er Ritan farin niðan um Skansatanga á veg aftur út í Nólsoynna. Klokkan er farin av tíggju um kvøldið, og hon er á síni tíggjundi ferð aftur og fram síðan klokkan hálvgun sjey í morgun. Eg spyrji bara: Er betri ferðasamband enn við Rituni nakra aðrastaðni í allari verðini, og við betri skipi?

Nú loysir hon aftur í Nólsoy – klokkan er hálvgum ellivu – enn er ljóst, og tað er dýrdarveður, so hon sæst koma út ígjøgnum innsiglingina í Nólsoy. Um tjúgu minuttir leggur hon at á Bursatanga eftir ein arbeiðsdag upp á sekstan tímar.

Tað er ikki bara í dýrdarveðri, hon siglir hesar tíggju túrarnar, men í øllum veðri hvønn dag.

Við øllum góðynskjum við eydnu til Ternuna, sum nú fer at røkja rutuna millum Nólsoy og Havnina.

Saknur verður í, tá ið Ritan ikki sæst í Nólsoyarfirði longur.

Tíðindaskriv frá Felagnum Føroyskir Peningastovnar

## Nýggja KT-skipanin er trygg – men krevur meiri tilvenjing enn væntað

*Fjølmiðlarnir hava hesar seinastu tvær vikurnar viðgjørt trupulleikar, sum eru íkomnir í sambandi við umleggingina av KT- skipanini hjá peningastovnunum. Tøkniligi parturin av umleggingini hevur gingið væl, øll data eru komin upp á pláss, skipanirnar eru góðar og trygdin er góð. Tá tað er sagt, so hava kundar okkara merkt munandi avbjóðingar við at taka Netbankan, og í ein ávísan mun Telefontænastuna, í nýtslu.*

Tað at meginparturin av føroyskum húsarhaldum og virkjum skuldu taka eina nýggja skipan í nýtslu samstundis, hevur havt við sær ein sera stóran tørv á vegleiðing og hjálp. Tørvurin hevur verið so stórur, at peningastovnarnir tíverri ikki hava havt orku at svara øllum fyrispurningum. Peningastovnarnir harmast um, at hetta hevur verið til ampa hjá kundum.

### Tilvenjing til netbankan

Netbankin og Telefontænastan eru nýggjar og øðrvísi enn tær gomlu skipanirnar, og tí hava kundar havt trupult við at rita seg inn fyrstu ferð. Peningastovnarnir hava síðani umleggingina havt telefonirnar opnar til kl. 22.00 fyri vegleiðing, og eisini eru lærufilmar og vegleiðingar tøkar á heimasíðunum hjá peningastovnunum. Nú tvær vikur eftir umleggingina hava 60% av kundunum tikið Netbankan í nýtslu.

### Bókingar uttan avsendara – verður bøtt

Serliga vinnukundar hava gjørt vart við, at teir ikki síggja hvørjum flytingar eru frá, tá teir fáa gjøld inn frá kundum. Í gamla Netbankanum var tað soleiðis, at kontunavnið hjá avsendaranum stóð í bókingaryvirlitinum. Í nýggju skipanini eru upplýsingar um avsendara eisini tøkir, bæði sum útgreining í bókingaryvirlitinum, og á kontuavritinum, sum eru tøk í skjalagoymsluni. Í einstøkum førum manglar tó avsendari, og arbeitt verður við at betra hetta.

### Víðkað atgongd til kontuavrit – er rættað

Í einstøkum førum hava brúkarar, sum í gomlu skipanini høvdu fingið fulltrú til at síggja avrit av ávísum kontum hjá virkjum og



stovnum, t.d. foreldur, sum hava fulltrú til flokskontu hjá skúlaflokkinum hjá børnum sínum, av misgáum fingið víðkað loyvi til at síggja avrit av øðrum kontum hjá virkinum/stovninum. Talan var um eitt mistak í umleggingini, sum nú er rættað, og tað er tí ikki møguligt longur hjá hesum brúkarum at síggja annað enn tað, tey hava fulltrú til. Týdningarmikið er tó at hava í huga, at ongin hevur fingið atgongd til at gera flytingar av kontum hjá øðrum, sum viðkomandi ikki eigur at hava atgongd til, og longu frammanundan hevði atgongd til.

### P-tal á kvittanum – er rættað

Í farnu viku kom fram, at P-talið hjá einstøkum sjálvtøkukundum stóð á kvittanini, hesir fingu úr sjálvtøkunum. Orsøkin var, at p-tal av misgáum var komið at standa á lønarbókingini hjá lønmóttakarum og er hesin feilur nú rættaður, soleiðis at hetta ikki kemur fyri í framtíðini. Vert er at geva gætur, at kundin bert hevur sæð sítt egna P-tal, og ikki P-tøl hjá øðrum kundum.

### Góð skipan – sum kann gerast enn betri

Nýggja skipanin er ein trygg, nútímans og vælvirkandi skipan, sum 54 bankar í Danmark, 83 bankar í Noregi og 3 bankar í Svøríki nýta til at nøkta tørvin hjá 3,6 milliónum viðskiftafólkum og 9.500 starvsfólkum. Skipanin hevur víst í verki, at hon er kappingarfør við altjóða bankaskipanir.

Í Føroyum hava avbjóðingar verið fyrstu tíðina, og arbeitt verður av øllum alvi at loysa nevndu trupulleikar, og við at gera skipanina enn betri. Vit biðja okkara kundar halda okkum til góðar hesa fyrstu tíðina.